

## Skar fostur úr kvinnu

Mánadagin varð ein kvinna, full upp undir hendur, dripin í amerikanska statinum Massachusetts. Síðani skóru gerningsmenninig átta mánaðar gamla fostrið úr mammunu og flýddu.Men nú hevur løgreglan funnið barnið, enntá á lívið, skrivar Boston Globe. Lítla nýføðingurin, ein genta, varð funnin í grannastatinum New Hampshire. Løgreglan hevur handtikið eina 35-ára gamla kvinnu í málinum. Hon er skuldsett fyri at rýma undan løgregluni í einum møguligum burturflytingsmáli, men kvinnan er ikki skuldsett fyri manndráp. Tað fer kanningin tó at avgera. Hon varpaði ljós á seg sjálva, tá hon hon segði vinfólkum, at hon hevði átt í síðstu viku, men vinfólkini vistu einki um, at hon var við barn, og tá málið um dripnu kvinnuna kom fram, fingu tey illgruna. Sambært løgregluni kendu offurið og tann skuldsetta hvørja aðra, skrivar Boston Globe.

# Positivir roknskapir skapa optimismu

**Hálvársroknskapirnir hjá fleiri av stóru fyritøkunum í heiminum vísa eina positiva gongd, og tað skapar eina ávísa optimismu, tó at gongdin eisini gera tað meiri sannlíkt, at fyritøkurnar ikki megna at liva upp til væntanirnar**

BÚSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Bæði partabrøv og realkredittlánsbrøv høvdu eina positiva viku, við positivum roknskapum og lyklatølum.

Roknskapurin hjá Nordea var betur enn væntað, og tað vóru serliga handilsinntøkurnar, sum vóru hægri og niðurskrivingarnar og avsetingarnar, sum vóru lægri enn roknað við framman undan.

Stóra amerikanska fastfood ketan, McDonalds, kunngjørdi ein roknskap við einum heldur verri úrsliti enn væntað, tó at sølan var hægri. Tað er serliga lági dollarkursurin, sum ávirkar úrslitið, tí inntøkurnar uttanífrá verða vekslaðar um til dollarar.

Tøkni fyritøkan, Apple, vísti ein góðan roknskap, har serliga framkomna iPhone hevur ávirkað úrslitið positivan veg.

Netfyritøkan Yahoo hevði ein roknskap, har úrslitið gjørdst betri enn væntað, hóast umsetningurin lækkaði. Hetta kemst serliga av umstruktureringum hjá fyritøkuni og færri starvsfólkum.

### Hægri væntan

Eftir mongu positivu hálvársroknskapirnar hjá amerikanskum bankum var væntað, at eisini Morgan Stanley fór at koma við einum góðum roknskapi. Hetta hendi kortini ikki, men av tí at aðrir bankar høvdu góðan roknskap, hevur hetta ikki ávirkað partabrøvini stórvegis.

Morgan Stanley kunngjørdi, at teir hava goldið pengar aftur til amerikansku stjórnina, men tað vóru serliga handilsinntøkurnar, sum náddu somu úrslit, sum hjá hinum bankunum.

Fleiri aðrar fyritøkur hava kunngjørt positivar roknskapir, men vandi er í hvørjari vælferð. Positivu roknskapirnir ávirka framtíðarútlitini positiva vegin, og tí kunnu fyritøkurnar fáa truplari við at liva upp til væntanirnar. Tí samstundis, sum partabrævakursirnir hækka, mugu inntøkurnar hjá fyritøkunum fylgja við, fyri at partabrævakursirnir skulu halda sær.

### BTÚ kunngjørt

Í seinastu viku vísti sølan av gomlum sethúsum framgongd triðja mánaðin á rað, meðan sølan av nýggjum húsum hevur verið rímiliga støðug alt árið. Hetta kann tulkast sum ein stabilisering av amerikanska sethúsamarknaðinum.

Sum kunnugt var tað júst amerikanski sethúsamarknaðurin, sum var upprunin til altjóða fíggjarkreppuna.

Í dag verður Ecenomic Sentiment vísitalið kunngjørt. Væntað verður, at tann stóri vøksturin, sum hevur verið seinastu tríggjar mánaðirnar, ikki fer at verða eins stórur hesaferð.

Stóri dagurin hesa vikuna verður í morgin. Tá verður amerikanski vøksturin í BTÚ fyri annan ársfjórðing kunngjørdur. Tað verður roknað við, at negativi vøksturin í frá fyrsta ársfjórðingi verður minni hesaferð.

Nógvar fyritøkur almannakunngera hálvársroknskapir sínar hesa vikuna. Av hesum kunnu nevnast danska flutningsfyritøkan DSV. Eisini Daimler og Deutsche Bank koma við sínum hálvársroknskapum.

*Kelda: Føroya Banki*




# Vána tøl fyri Danfoss

**Altjóða ídnaðarfyritøkan, Sauer-Danfoss, fekk eitt út av lagi vánaligt úrslit fyri annan ársfjórðing**

ROKNSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Vánaligа úrslitið hjá Sauer-Danfoss kann fara at kosta arbeiðspláss*

Sauer-Danfoss, sum umfatar ein triðing av Danfoss-samtakinum, fekk eitt nógv verri úrslit fyri annan ársfjórðing, enn leiðslan roknaði við fyri bert fáum mánaðum síðani.

Bíleggingarnar minkaðu heili 73% í mun til sama ársfjórðing í fjør, sigur fyritøkan í einari fráboðan til børsin í New York.

Í fráboðanini verður sagt, at umsetningurin er farin niður um helvtina í øðrum ársfjórðingi í ár. Sven Ruder, forstjóri, sigur, úrslitið av altjóða niðurgongdini er verri, enn leiðslan roknaði við fyri bert trimum mánaðum síðani.

Tí fara vit at seta fleiri tiltøk í verk fyri at minka um útreiðslurnar. Vit kunu ikki við vissu siga, um vit eru komin á botn, sigur Sven Ruder.

Einki verður sagt um, hvørt tiltøkini koma at kosta arbeiðspláss.

Sauer-Danfoss hevur 9800 starvsfólk á fabrikkum í 22 londum, harav 2700 í Danmark, skrivar Børsen.